Fylgiskjal 13

LM-016/2023

Brotsfrøðifelag Føroya

2023-07-21

Ummæli Brotsfrøðifelags Føroya um broytingar í revsilógarinnar kap. 1-11

Ummæli av kap. 1-11 í revsilógini

Samfelagstænasta 1
Treytaður dómur skal nú altíð fáa ásetta revsing 2
Onnur revsing 2

Samfelagstænasta

Vit fegnast um, at hugsað verður um aðra revsing enn fongsul. Í hesum føri samfelagstænastu, sum vit halda vera eitt gott amboð. Vit halda samfelagstænastu vera eitt gott amboð, tí tað í størri mun fyribyrgir afturstigi (da. *tilbagefald*).

Vit halda sumt vera at gáa um.

Tilboðini

Tilboðini mega vera til í samfelaginum. Samfelagstænasta, ið eisini ber við sær viðgerð, krevur at føroyska samfelagið kann bjóða tilboðini. Kriminalforsorgin hevur ikki tilboðini, men brúkar tey, ið finnast í samfelaginum annars. Hetta mega politikkarar vita sær: Tilboðini mega vera til í samfelaginum.
Rúsevnismisnýtslutilboðini eru avmarkað í Føroyum. Spælióvógvarviðgerð finst ikki og heldur ikki kynslívsfrøðiliga viðgerð til pedofilar og skemmarar annars.

Ambulant viðgerð er nærum ikki tøk í Føroyum. Viðgerð sum ein partur av samfelagstænastu er gott. Tó verður tá tosað um ambulanta viðgerð, ið nærum ikki er tøk í Føroyum.

Kring alt landið. Eisini er ein landafrøðiligur trupulleiki at bjóða øllum føroyingum regluliga viðgerð, ið ikki krevur langa ferðing. Viðgerðin má verða tøk kring alt landið.

Samfelagstænasta er harður dómur

Samfelagstænasta er næstan líka hørð sum treytaleyst fongsul. Samfelagstænasta má vera valkostur til treytaleysa fongsulsrevsing - ikki valkostur til treytaða fongsulsrevsing. Í verki verður tó mangan dømt til samfelagstænastu í sambandi við treytaðan dóm. Tað kann tykjast sum at skipanin heldur hetta slag av dómi vera linari enn fongsul, og hevur lyndi til at brúka hetta ið so ofta. Vit halda, at hava má í huga, at samfelagstænasta bert skal verða dømt einum til, um hugsað verður um fongsul, men har samfelagstænasta verður mett at vera meir hóskandi revsing. Tess fleri samfelagstænastudómar eru, tess færri fongsulsdómar eiga at vera. Tó hevur talið á fongsulsdómum verið vaksandi saman við at samfelagstænstudómar hava verið vaksandi.

Samfelagstænasta kann bera við sær tvífalda revsing, tí tað so eyðsýnt og kann kennast sum, at ein verður útstillaður og fær skemdarblett (da. *stigma*).

Ikki samfelagstænastu fyrstu ferð. Samfelagstænasta er ikki lægst á stiganum og er ikki hóskandi, um ein er dømdur fyrstu ferð og fær linan dóm. Tá er treytað fongsulsrevsing linari. Enn linari er at tosa um brotið andlit til andlits, og er samstundis helst eisini tað virknasta.

Treytaður dómur skal nú altíð fáa ásetta revsing

Altíð at áseta revsing kann enda við at herða revsingina. Lógaruppskotið sigur, at treytaður dómur altíð skal fáa ásetta revsing. Hetta kann enda við herðing. Og lógaruppskotið svarar ikki, hví hetta verður gjørt. Tað tykist sum eitt blint avrit. Tað kann vera, at hin dømdi er batnaður síðan fyrru revsiásetingina. At revsing altíð er ásett, kann loyva skipanini lættliga at halda seg til ta gomlu ásetingina. Sjálvt um hon skal gera eina nýggjan meting, kann vera lættari at hanga í teirri gomlu.

Boðskapurin verður herdur. Boðskapurin er eisini okkurt at hugsa um. Áður fekk viðkomandi eina skortfleingju við treytaðum dómi. Nú fær viðkomandi lovað revsing. Hugburðurin snýr seg tí meira um revsing. Vit eiga ikki at vera hørð, men gløgg móti brotsverki, tí tað ræður um at vera langskygdur og ikki stuttskygdur.

Onnur revsing

Tað er umráðandi at hugsa um aðra revsing enn fongsulsrevsing. Umframt samfelagstænastu eru aðrir góðir hættir:

Semingsstevna (no. *konfliktråd*)

Endurreisnarrættur hóskar Føroyum sera væl. Endurreisnarrættur (en. *restorative justice*) er í stuttum annar háttur enn vanlig revsing, og letur partarnar taka lut í at loysa trætumálið, og letur teimum soleiðis trætumálið aftur í hendur (Christie, 1977)[1]. Hetta halda vit fara at vera serliga gagnligt í lítlum og tættum samfelagi sum í Føroyum, er sambondini eru so rík og álitið mikið. Hetta kann nýtast í mongum málum, og ætlar brotsfrøðifelagið at virka fyri at kanna og lýsa hetta nærri.

Noyddur semingur kann hugsast. Hetta er ikki siður nú, men kanska vert at umhugsa. Kanska serliga í gomlum siðamisbrotamálum, ið eru fyrnað?

Semingsstevnu (no. *konfliktråd*) eiga vit at kanna nærri.

Heimafongsul

Heimafongsul, t.e. fótfjøtur. Heimafongsul er ikki komið til Føroya enn. Niðri hevur tað í fleiri ár borið til at fáa heimafongsul upp á dóm upp til 6 mánaðir.

Fyrisitingarlig avgerð ella dómur. Um rætturin dømir fongsulsrevsing, kann hin dømdi søkja Kriminalforsorgina um at sita í heimafongsli. Harvið er hetta ein fyrisitingarlig avgerð, og ikki sum samfelagstænasta, ein dómur avsagdur av rættinum.

Misjavnt í kongsríkinum. Tað tykist løgið, at tað skal vera ymis revsing í kongsríkinum, at ein við heimafongsli kann fáa lagaligari revsing í Danmørk enn í Føroyum. Hetta eigur at kunna setast í verk í Føroyum eisini. Tó er vert at umhugsa, um tað skal vera ein fyrisitingarlig avgerð ella rættaravgerð.

[1] Christie, N. (1977). Conflicts as Property, The British Journal of Criminology, Vol. 17. No 1.

LM-016/2023

LM-016/2023

Ung

Ungum tørvar aðra revsing, at tey ikki skulu verða send niður. Vit eiga at hugsa um aðra revsing, serliga tá ið tað eru ung, tí vit fáa ikki hýst ungum brotsmonnum í Føroyum sum nú er. Tað endar við at ung verða send niður, og tað er øgiliga keðiligt.

Afturstig

Norðmenn hava minst afturstig, og tó taka vit eftir dønum. Norðmenn hava lægsta afturstigstal (da. *recidivrate*) í brotsverki: Nýskipan í Noregi í fongsulsrevsing.

Danir hava hægsta! Og kortini taka vit altíð støði í Danmørk.

Endamálið: forða afturstigi

Norðmenn forða afturstigi, danir brotsverki. Nevnda endamálið hjá norðmonnum er at forða afturstigi, at falla í aftur (individual præventiv).

Nevnda endamálið hjá dønum er at forða brotsverki (við innibúran).

Danmørk herðir, men lukkast ikki at forða. Danmørk herðir revsingina sum árini líða, men minkar ikki um ávís brotsverk: Ofre for anmeldte forbrydelser.

Minni fongsulsrevsing í Íslandi

Íslendingum hilnast væl. Teir revsa minni og venja meira uppaftur. Íslendingar eru farnir meira við uppafturvenjing (da. *rehabilitering*) og mildari revsing, sum hevur ført til meira tol. Tað hevur minkað nógv um bíðilistan til at sita, úr 629 niður í 320. 42 kvinnur og 189 menn eru í samfelagstænastu 05/2023. Tvey opin fongsul eru, annað loyvir kvinnum, 177 kømur tilsamans, og ein "útslusningseind". Fleiri valkostir eru í boði móti fongsli: fótfjøtur, semingur (da. *konfliktmægling*), samfelagstænasta. T.d. kann 24 mnð. fongsul broytast til samfelagstænastu. Tað er nógv bíligari.

Sí frágreiðing: The case of Iceland.

Vit fegnast sum sagt um, at hugsað verður um annað enn fongsul. Brotsfrøðifelagið heldur tað vera týdningarmikið at hugsa føroyskt á revsirættarøkinum. Annað er kanska ábyrgdarleyst, tá ið saman um kemur. Vit eiga at hugsa um føroyska samfelagið, mentanina, og at fáa brotsmenn endurmentar og at vera góðir grannar og skyldfólk hjá øllum.

Við kvøðu,
umboðandi felagið
Ingmar Berg Mikkelsen, formaður
518109, ingmarbm@gmail.com